# Kjak

**Kristian Hansen**
*cand.theol. Klaksvík*

## Fróðskaparsetrið og tann søguligi ella mytologiski Jesus

*Nú um dagarnar hava føroyingar havt vitjan av heimskenda og háttvirda professaranum Richard Bauckham*

Á heimasíðuni hjá Fróðskaparsetri Føroya stóð skrivað tann 22. august, at Bauckham verður mettur at vera ímillum fremstu og mest viðurkendu gudfrøðingum í Bretlandi seinastu 20-30 árini. Hann fekk p.hd-prógv í søgu frá Cambridge. Í 15 ár undirvísti hann gudfrøði í universitetinum í Manchester. Í 1992 gjørdist hann professari í gudfrøði við universitetið í St. Andrews í Skotlandi. Í 2007 segði hann starvið frá sær og flutti til Cambridge, so hann fekk betri stundir at granska og skriva bøkur.

Eisini varð sagt, at akademiskt er Richard Bauckham breiður. Millum hansara serliga kendu verk er "Jesus and the Eyewitnesses" (frá 2006), sum viðger evangeliini sum eygnavitnisfrásagnir og vísir, hvussu søguliga álítandi evangeliini eru. Ímillum gudfrøðingar er bókin longu kallað ein klassikari tá talan er um trúvirði í evangeliunum.

Í "God Crucified: Monotheism and Christology in the New Testament" (frá 1998) viðger Bauckham spurningin um, hvussu jødiskir monoteistar kunnu koma til at trúgva, at Jesus bæði er menniskja og Gud.

Á føroyavitjanini var m.a. Miðlahúsið karmur um fyrilestur hjá Bauckham mánadagin 23. august og Fróðskaparsetrið var karmur um fyrilestur týsdagin 24. august í veitsluhøllini á Føroya Læraraskúla og møguleiki var at ogna sær bøkur hjá Richard Bauckham. Sigast má, at Fróðskaparsetur Føroya hevur alt rós uppiborið at vísa gestablídni.

Men í hesum sambandi kann eg ikki lata vera við at undrast. Fróðskaparsetur Føroya hevur undir sær bókaforlagið Fróðskapur. Í viðtøkunum hjá hesum forlagi stendur m.a. í § 2: "Endamál felagsins er at reka vísindaligt útgávuvirksemi og annað virksemi, sum náttúrligt hoyrir til slíkt virksemi." Í 2007 gav hetta forlag út bók, ið nevndist "Guds orð ella orð um Gud" (stytt GooG), sum m.a. er ein fullkomin uppgerð við søguvirðið í evangeliinum. Viðvíkjandi søguvirðinum hjá Nýggja Testamenti verður m.a. sagt:

"Trupulleikarnir, sum søgugranskarar standa yvirfyri, eru..., at tekstirnir í Nýggja Testamenti, sum kunnu siga nakað um tann søguliga Jesus, eru upprunaliga skrivaðir 40-70 ár eftir krossfestingina av nøkrum høvundum, sum – uttan at teir nakrantíð persónliga kendu ella hittu Jesus – trúðu uppá uppreisnina. Tað hevði sostatt langt frá loyst allar trupulleikar, um granskarar visti, at teir høvdu upprunahandritini." (GooG, s.81)

"eingin av evangelistunum var eygnavitni... Hendan sannroyndin..., hevur við sær, at søguliga kelduvirðið í evangeliinum kann hugsast at vera rættiliga ivasamt." (GooG, s.78)

"Tað er rundanum søguligar persónar, sum vit lítið og einki vita um, at mytur kunnu verða skaptar. Jesus er eitt skúladømi um ein tílíkan persón." (GooG, s.82)

Og viðvíkjandi læruni um, at Jesus er bæði menniskja og Gud, verður m.a. soleiðis tikið til:

"Tað tykist í øllum førum vera soleiðis, at tann Jesus, sum vit møta í teimum elstu varðveittu handritunum av tí mest álítandi evangeliinum, Markus, sum stava frá 3. øld e.Kr., ikki er guddómliggjørdur – t.e., at hann ikki sigur seg vera ella ger krav uppá at vera Gud." (GooG, s.125)

Við bókaútgávuni hjá Fróðskapi verður sotatt størsti parturin av granskingini hjá Bauckham vrakaður. Og skulu vit trúgva hesi "vísindini" frá Debesartrøð, so er lítið skil á professaranum frá Cambridge, hóast Bauckham á heimasíðuni hjá Setrinum verður prýddur við føgrum lýsingarorðum.

Sum sagt hevur granskingin hjá Bauckham víst, hvussu søguliga álítandi skriftirnar í Nýggja Testamenti eru. Bauckham metir, at tað ikki er vísindaliga haldbart at gera mun á einum søguligum Jesusi og tí Jesusi, sum tey fyrstu kristnu trúðu á. Tað er bert ein Jesus, og tað er "The Jesus of the Eyewitnesses".

Eg kundi hugsað mær at fingið at vita, um Fróðskapur (sum skal tryggja vísindaliga støðinum í okkara landi) hevur broytt kós viðvíkjandi spurninginum um trúvirðið í evangeliunum? Skulu vit lata vera við at keypa bókina, sum Fróðskapur gav út, og sum óbeinleiðis sigur, at konfirmatiónsundirvísingin her á landi byggir á fiktión? Ella skulu vit halda okkum til Bauckham?

Eitt annað sum vekir undran er, at fyri árum síðan heiðraði Miðlahúsið høvundan av áðurnevndu bók við ársins kjakvirðisløn fyri sítt íkast til kjakið í Føroyum. Men síðan hevur Miðlahúsið ikki kosið nakran "føroyameistara" í kjaki. Nú er so Miðlahúsið karmur um fyrilestur hjá Bauckham. Á blaðsíðu 163 í GooG verður ávarðað ímóti at nýta bíbilskar grundgevingar í samfelagsligum kjaki. Tað var júst hetta Bauckham gjørdi í Miðlahúsinum.

Eg veit ikki, um kulturelitan í Føroyum er eitt ríki, sum er komið í stríð við seg sjálvt. Men Bauckham er professari í Cambridge, so kanska er akademiska snobbið orsøkin til hesa margháttligu andsøgn.

*Sum sagt hevur granskingin hjá Bauckham víst, hvussu søguliga álítandi skriftirnar í Nýggja Testamenti eru. Bauckham metir, at tað ikki er vísindaliga haldbart at gera mun á einum søguligum Jesusi og tí Jesusi, sum tey fyrstu kristnu trúðu á. Tað er bert ein Jesus, og tað er "The Jesus of the Eyewitnesses"*



**Jóna Mortensen**

## Hvussu gongur við Boðanesheiminum, Heðin ?

Borgarafundurin var 28/1-2009. Aftan á fundin var ein kjaksending í sjónvarpinum, har Rósa Samuelsen, Heðin Mortensen og eg luttóku. Har varð millum annað sagt, at tað skuldi ikki ganga rúm tíð, áðrenn eitt røktarheim stóð úti á Boðanesi, sum skuldi hava 64 búðpláss.

Nú skriva vit 5. september 2010. Heimið hevur longu fingið navn, men enn er spakin ikki settur í til at byrja byggingina.

Vit síggja við jøvnum millumbili, at skrivað verður í bløðini um tey gomlu, sum liva undir óvirðiligum umstøðum, tað hava vit sæð fleiri dømi um. Ein kona kærdi herfyri sína neyð. Maður hennara, sum er vorðin hjálparsleysur, er røktarsjúklingur, er endaður á sjúkrahúsinum í Klaksvík, sjálvt um tey altíð hevur búð í Havn. Pláss er ikki fyri honum á Landsjúkrahúsinum longur, og einki røktarheim er at fara á. Hettar er ikki nakað eindømi. Støðan er einki broytt, enn liggja liðugtviðgjørd gomul fólk á Landsjúkrahúsinum alt ov leingi, tey eru røktarsjúklingar og hava ongastaðni at fara. Sama søgan, nú næstan 2 ár aftan á borgarafundin. Tummas í Garði úttalaði seg um tað sama, segði at Landsjúkrahúsið ikki hevði ábyrgdina av sjúklingum, tá tey vóru liðugtviðgjørd, tað var Tórshavnar kommuna sum mátti hava ábyrgd av sínum borgarum. So kemur svar í Dimmalætting 3. september, frá Heðin Mortensen, har hann sigur: »Tað er ikki kommunan ið hevur ábyrgdina av eldraøkinum, tað hevur landið.« Kommunan hevur í lóggávu fingið heimild til at byggja ellis- og røktarheim, um landsstýrið góðkennir verkætlanina og játtar rakstur til heimini. Hettar merkir ikki, at kommunurnar hava ábyrgd av, at fólk, ið hava tørv á røkt fáa hana.

Hettar »skurrar« í mínum oyrum. Trupulleikin er, at kommunan hevur einki røktarheim at bjóða hesum somu fólkum, hví? Tí onkur hevur sovið í tímanum og ikki fylgt upp uppá, hvussu stórur tørvurin er. Um tað er land ella kommuna er revnandi líka mikið. Tað virkar so óbúgvið at keglast í bløðunum um, hvør hevur ábyrgdina, ístaðinfyri at TAKA ábyrgd og gera nakað við trupulleikan. Vit hava ØLL ábyrgd av at okkara gomlu verða virðiliga viðfarin, serliga politikararnir, vildi eg hildið.

Um man ikki kann finna útav at arbeiði yvir um mørk í Føroyum við 50.000 íbúgvum, ja so er ikki ringt at skilja, hví tað er kríggj úti í tí stóru verð. Vælsignan eigi tykkum, byrjið at arbeiða fyri at fólkið fær tað betur, og gravið hasa barnsligu stoltheitina niður.